Lívdin
- í lívd hins hægsta

Apríl 2009



# Zareptalegan 2009



Vikuskiftið 13. til 15. mars var samkomulega hjá Lívdini á Zarepta. Heitið á leguni var "Vit skulu gera okkum til reiðar og byggja (Neh. 2:18) - Karmurin um mál okkara".

Fríggjakvøldið á leguni var hugnaløta við skemti, sangi og hugleiðingum. Leygardagin greiddu Jóhan Syderbø, Jákup Jacobsen og Jógvan Zachariassen frá um bæði andaliga bygningin og um fysiska bygningin, sum skal byggjast við Vegin Langa. Sunnudagin var dópur og morgunmøti.

Tey sum vórðu doypt vóru: Karin Elisa Djurhuus, Hjørdis Matras, Kirstin Ljósheim, Ruth Poulsen og Krista Krett Áargarð.

Har var nakað fyri øll. Umframt ítriv o.a. var fótbóltsspæl á graslíkisvøllinum og kassa-stápling millum bæði húsini, sum vísti seg at vera bæði spennandi og gott undirhald.

## Páskirnar

Páskirnar – tíðin, har Betlahem og Jerúsalem, krubban og krossurin og jólini og páskirnar møtast. Tíðin, har sorg og gleði, vónloysi og vón og veikleiki og styrki liva harmoniskt saman. Tíðin, har Kongurin bleiv krýndur við tornakrúnu, Frelsarin ofraður og Kristus krossfestur.

Hetta er eisini tíðin, har Kongurin sigraði á fíggindum Sínum, Frelsarin gav lív til fortapt menniskju, og Kristus bleiv vón heimsins. Máttu hesar páskirnar aftur verið slíkar fyri okkum, har vit av nýggjum síggja, hvat Hann hevur gjørt fyri okkum, og hvussu vit kunnu bera offur okkara til Hansara.



*Jógvan Zachariassen*

# Vinir í Lívdini

### Tillukku Linda!

Fríggjakvøldið 27. mars vann Linda Andrews donsku X-Factor kappingina 2009.

Á jólum 2008 høvdu vit í Lívdini vitjan av Lindu, tá hon sang, og Gunnar Guttesen spældi.

Vit ynskja Lindu hjartaliga tillukku.



*Linda Andrews syngur í Lívdini*

### Starvsfólk til Blákrosskaféina

Kafé Blákrossstovan sóknast eftir sjálvbodnum starvsfólki til kaféina í Kongagøtu í Havn.

Kundi tú hugsað tær at arbeitt á kaféini, ert tú vælkomin at venda tær til Yvonnu Drangberg á tel. 520607 ella á telduposti: yvonna@blakross.fo

Bláí Krossur

### Tillukku við barninum

1. mars fingu Jastrid Hovland Sivertsen og Absalon Østerø Sivertsen í Havn eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3.850 gr.



### Njót av tí náði

Á møtinum í Lívdini sunnudagin 22. mars las Árni Jacobsen úr Klaksvík hesa yrking sína:



*Árni Jacobsen*

Rúni Olsen tók í tøkkini á morgunmøtinum í Betesda 8. august 2008 soleiðis til um Guds gávur og kærleika: “Her er nokk til!” Tá kom eg at hugsa um matmóðrina, sum hevur sett á borðið og bjóðar gestunum at fáa sær við orðunum: “Fáið tykkum, her er nokk til!” Soleiðis er eisini við gávum og náði Guds.

Njót av tí náði, ið givin tær varð,
størri hon er enn títt skil.
Ævig hon er, inn í Himmalin nær.
Njót - her er ovmikið til!

Njót av teim gávum, ið Harrin tær ber,
steðga og njót lítið bil.
Fá tær av borðinum, mettaður verð.
Njót - her er ovmikið til!

Njót av tí kærleika, vístur tær er,
ei fyri øðrum hann dyl.
Kenn henda kærleika á tíni ferð.
Njót - her er ovmikið til!

Njót av tí keldu, tær rennur við lið,
sløkkja tín tosta hon vil,
og gjøgnum lívið hon veitir tær frið.
Njót - her er ovmikið til!

*Yrkt: Árni Jacobsen 08.09.08*

## Myndir frá Zareptaleguni 2009

*Myndir: Pauli Djurholm*



# Tiltøk

### Tiltøk á Brekku 3

(bygningurin aftan fyri MBM)

**Undirvísing og bøn eru týskvøld kl. 20.**

| | |
|---|---|
| 7. apríl: | Húsbólkar |
| 14. apríl: | (Einki møti) |
| 21. apríl: | Dópur í Hebron á Argjum |
| 28. apríl: | Húsbólkar |

### Bønarløtur á Brekku

Skipað verður fyri bønarløtum í hølunum á Brekku hvønn mánadag kl. 08.10, hvønn týsdag kl. 16.10 og hvønn fríggjadag kl. 12.10. Haraftrat er ein bønarløta hvønn sunnumorgun kl. 10.10 í Hoyvíkar skúla.

Á bønarløtunum á Brekku verður umframt at biðja eisini gingið gjøgnum bønirnar í Sálmunum. Tað eru Jógvan Zachariassen og Poul Guttesen, sum skipa fyri.

## Verið við til at stuðla

Við fastari mánaðarligari flyting til byggigrunnin hjá Lívdini ber til at stuðla við at seta pening inn á konto nr. 9181-530.707-6 í Eik Banka. Flytingarskjøl eru á kunningarborðinum í Lívdini sunnudagar.




# Skráin fyri møtini í Hoyvíkar skúla

## Sunnudagin 5. apríl

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Juvel II og Grønland*
*Talarar: Vitnisburðir / opið evni*
Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Rómbrævið 12: 9-21*
*Talari: Jógvan Zachariassen*



Jógvan

## Sunnudagin 12. apríl *(Uppreisnarmorgun)*

Páskamøti í skúlanum kl. 10.30

Ólavur



## Sunnudagin 19. apríl

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Bøn*
*Talari: Ólavur Jøkladal*
Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Rómbrævið 13: 1-14*
*Talari: Jógvan Zachariassen*

## Sunnudagin 26. apríl

Familjumøti kl. 10.30: *Talarar: Glóðin*
Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Nehemias visiónir*
*Talarar: Leiðslan*



** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*

Gleðiligar páskir :)

*Útgevari: Samkoman Lívdin – www.livdin.fo · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson · Teldupostur: faldarin@livdin.fo*